Kattakongur er kongafiskur

Tann froskmaðurin, ið slær tunnuna niður á Havnarvág leygardagin, verður ikki katta kongur, men kongafiskur. Tórshavnar Froskmannafelag skipar fyri tunnusláing fyri froskmenn leygardagin kl 14

TUNNUSLÁTTUR
Tórshavnar Froskmannafelag

Leygardagin kl 14 skipar Tórshavnar Froskmannafelag fyri tunnusláing á Bursatanga í Havn. Hetta hevur verið ein afturvendandi táttur, sum av froskmonnum kring landið og áskoðarum hevur verið sera væl dámt.

Tað er ikki neyðugt at vera limur í Tórshavnar Froskmannafelag fyri at vera við til sjálva tunnusláingina, men øll sum eiga drakt eru vælkomin.

Tórshavnar Froskmannafelag, sum hevur 45 ár á baki, hevur seinastu mongu árini skipað fyri tunnusláing á sjónum. Hendan løtan er vanliga sera skemtilig bæði fyri limirnar og ikki minst fyri teir mongu áskoðarar, sum vanliga leita sær oman á Bursatanga hendan dagin. Børnini eru sjálvandi tey, sum stuttleika sær mest yvir hesar menn og kvinnur, sum ikki himprast við at leypa eftir høvdinum av bryggjuni á bláman.

Tann, ið slær tunnuna niður verður róptur fyri »Kongafiskur« og umframt at verða blakaður upp á turt, fær hann sjálvandi eisini eina gávu fyri avrikið.

Vanliga verða kattakongar lyftir upp um høvd og bornir í gullstóli, men hetta letur seg sjálvsagt ikki gera á sjónum. Tí endar tunnusláingin hjá Tórshavnar Froskmannafelag ofta við einum vinarligum bardaga, har kongafiskurin stríðist fyri lívinum fyri at halda høvdinum oman á vatnskorpuni.

Nýggi báturin hjá froskmannafelagnum, »NJØRÐUR« liggur sjálvandi eisini á Bursatanga henda dagin, og høvi verður hjá luttakarunum at royna vatnskiirnar á vágni.

Limirnir og makar teirra sláa tunnu í neystinum hjá froskmannafelagnum leygarkvøldið kl. 20, og aftaná fáa teir eina góða fiskasúpan í felagshølunum.

150 froskmenn úr øllum Føroyum eru limir í Tórshavnar Froskmannafelag.

Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum sýndu hjálpsemi og samkenslu, tá góða mamma okkara, vermamma, omma, langomma og systir okkara

Signhild Djurhuus
Kollafirði

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum hjálptu til í Missiónshúsinum.
Tøkk fyri kransar og blómur, gávur til Missiónshúsið í Kollafirði og aðrar heilsanir.
Ein hjartans tøkk til tykkum á Ellisheiminum í Miðvági, sum vóru um hana.
Tøkk tit øll, sum fylgdu.

Familjunnar vegna
Børnini

Aldubáran tvær konsertir í Listaskálanum

KONSERT
Aldubáran

Í samband við árligu várframsýningina í Listaskálanum hevur føroyski yrkistónleikabólkurin, Aldubáran, tvær konsertir.

Í Aldubáruni eru níggju fastir limir. Fimm av teimum virka í Føroyum, og fýra arbeiða uttanlands. Á konsertini leygardagin 1. mars er bólkurin mannaður við fimm blásarum, ein sokallað blásikvintett.

Á konsertini sunnudagin 2. mars verður klaver við eisini. Tey, ið manna Aldubáruna hesaferð, eru:

Andrea Heindriksdóttir, floytu - Anna E Klett, klarinett - Eydís Franzdóttir, obo - Jógvan Zachariassen, fagott - Páll Sólstein, horn - Jóhannes Andreasen, klaver.

Siðvenja er, at eitt verk verður spælt, tá ið várframsýningin letur upp kl. 15:00.

Í ár verður tað blásikvintettin hjá Atla Petersen. Tveir tímar seinni, kl. 17:00, verður so konsert við Aldubáruni í komuhøllini í Listaskálinum. Á skránni er føroyskur blásitónleikur. Blásikvintettir eftir Kára Bæk, Edvard N Debess og Atla Petersen. Ljós og myrkur fyri solo klarinett eftir Kristian Blak, og eitt gamalt føroyskt Kingolag, sum Jógvan Zachariassen spælir á fagott.

Aldubáran hevur fyrr gjørt royndir við konsertforminum, og verður konsertin sunnudagin einki undantak. Verkini á skránni sunnudagin verða spæld í ymsum pørtum av Listaskálanum.

Á skránni eru fimm stykkir eftir franska kvinnuliga tónaskaldið, Claude Arrieu, eitt verk fyri obo, eitt verk fyri horn og kvintett í Es-dur eftir W. A. Mozart.

Mozart hevði stóran tokka til ljóðførini í blásikvintettini. Hetta kemur m. a. tíðiliga til sjóndar í brúkinum av hesum ljóðførum í orkesturklanginum, men so sanniliga eisini í kvintettini í Es - kv 452, sum er skriva fyri obo, klarinett, horn, fagott og klaver.

Konsertin sunnudagin er kl. 14:00.

Hatespeech, Gestir og Crashwave live í Gøtu fríggjakvøldið

KONSERT
Samtakið Grót

Um vikuskiftið verður enn ein konsert í røðini av konsertum við prixaktuellum bólkum í Losjuni í Gøtu, sum Tónleikasamtakið Grót skipar fyri.

Hesaferð eru m. a. tveir av bólkunum, sum skulu royna seg í 5. umfari í prixnum, og sum nógv seta stórar vónir til á palli í Gøtu, umframt ein av góðu bólkunum úr 3. umfari.

Hatespeech eru gamlir í garði og vóru kanska okkara fyrsti thrashbólkur tá miðskeiðsis í 90´unum, tá bólkurin byrjaði. Tað eru framvegis mong, sum halda at Hatespeech er ein av okkara allarbestu rokkbólkum, kanska serliga tí at teir hava megnað at endurnýggja stílin í takt við menningina innan harða rokktónleikin. Guitarleikarin Heðin verður eisini av mongum mettur at vera ein av fremstu guitaristunum í landinum. At Hans Marius, sangari í Flux, eisini er komin við bólkin fyri eini tíð síðan, er eisini við til at endurnýggja og gera bólkin spennandi.

Gestir eru ikki eins kendir sum Hatespeech, men teir hava verið við í ymsum høpi og hava vunnið sær stóra virðing fyri tær framførslur teir hava havt higartil. Stílurin er melodiøsur, nokkso harður rokkur, nakað skildur við nøvn sum eitt nú Radiohead, Jeff Buckley, Muse. Gestir og Hatespeech skulu kappast í prix Føroyum 5. umfari.

Triði bólkurin er Crashwave, sum komu sera væl frá framførsluni í 3. umfari í prixkappingini. Tey spæla nýmótans rokk, og hava eftir føroyskum mátistokki fleiri nýskapandi ting at bjóða.

Umframt breiða musikalska úrvalið er okkurt serligt fløgutilboð frá TUTL á skránni. Millum annað kanst tú ogna tær nýggju fløguna hjá Kára Sverrissyni fyri einans 100 kr.

Tiltakið verður í kvøld, fríggjakvøldið 28. februar kl 22. Kostnaðurin er 80 kr, tó fyri limir í Grót einans 50 kr.

Berlingarin 237 mió í halli

BLØÐ

Berlingske-konsernin hevur havt eitt soltið ár í fjør.

Undirskotið hjá konsernini í primera rakstrinum vísir eitt minus upp á 128 mió krónur. Tey einstøku feløgini í konsernini, BT, Berlingske Tidende o. fr., hava enn ikki almannakunngjørt roknskaprirnar.

Orsøkin til soltna úrslitið sendst fyrst og fremst av slaka lýsingarmarknaðinum, eins og bladkríggið móti Jyllands-Posten í Århus og móti Metro-Xpress í Keypmannahavn eisini hevur tært upp á miðlarnar hjá stóru bladkonsernini.